Smábarna-familjur og barnaansing

Hugleiðingar um pallborðsfundin í Norðurlandahúsinum sum skuldi snúgva seg um smábarnafamiljur og barnaansing. Sigrun Samuelsen skrivar



Tey mundu vera nógv, ið vóru vónsvikin av pallborðsfundinum um smábarnafamiljur og barnaansing sum var í Norðurlandahúsinum 30. mai.

Satt at siga føldi eg meg sum pallborðsluttakara rættuliga hildna fyri gjøldur av teimum báðum politisku pallborðsluttakarunum. Og tað mundu nógvir áhoyrarar og ikki minst fyrireikararnir eisini hava følt.

Har hevði eg gingið í dagavis og umhugsað, hvussu eg á besta hátt kundi lýsa støðuna hjá foreldrum og børnum, ið tørva dagstovnapláss, ella annað hóskandi stað hjá børnunum at vera, meðan foreldrini arbeiða. Hetta skuldi eg gera bæði sum mamma at tveimum børnum og sum sálarfrøðislesandi, við tí innliti tað nú einaferð gevur í m.a. tørv hjá børnum. Eftir at hava sitið og skrivað í tímansvi, helt eg meg vera komna fram til tað, sum eg kundi geva fyri at fáa ein góðan fund um hetta átrokandi mál. Tað sama høvdu hinir kvinnuligu pallborðsluttakararnir gjørt.

Men hvat høvdu so tey bæði politisku umboðini at bjóða? Jú, annar kom sleingjandi við tveimum tilvildarligum greinum, kliptum út úr onkrum donskum avísum. Hin hevði bert slipsið framman-fyri sær, og so eitt blankt pappir. Tað hevði so eisini verið alt í lagi, um tað var tí, at teir vóru so garvaðir fyrilestrahaldarar, at teimum als ikki nýttist at skriva gullkornini niður. Men tað sýntist ikki so at vera. Tí gullkornini høvdu teir slett ikki funnið. Høvdu ivaleyst ikki givið sær stundir til yvirhøvur at hugsa um fundin, fyrr enn teir sótu við pallborðið.

Til alla lukku — fyri tey politisku umboðini — so høvdu allar tríggjar kvinnurnar orðið fyrst. Tað gjørdi, at uppleggini (um vit yvirhøvur kunnu brúka so fint orð í hesum sambandi) hjá politikarunum blivu ein snúran og snaran, vendan og drejan av úttalilsunum hjá okkum trimum kvinnum, fyri tað mesta 90 gradir runt, soleiðis at tað bleiv til tað mótsatta av tí vit høvdu sagt.

Hygg, — hettar eru jú snildir, sum politikarar eru ekspertar í. Óroyndar sum vit allar tríggjar vóru í hesum, hoppaðu vit við báðum beinum í flórin, fyri at verja okkara egna skinn, og orðaskiftið bleiv til: »Tú segði, at eg segði..., tað segði eg slett ikki, eg segði...«. Og tað var jú akkurát tað politikararnir báðir ætlaðu. Harvið fingu teir vent orðaskiftinum frá tí viðbrekna og fyri teimum vandamikla høvuðsinnihaldinum, nevniliga: hvat skulu vit gera fyri at bøta um viðurskiftini hjá børnunum, sum í dag ongastaðni hava at vera í dagtímunum, meðan foreldrini eru til arbeiðis.

Annar sat, við stjørnum í eygunum og gloriuni hómandi yvir høvdinum, og messaði um hettar neyðars barnið, barnið, barnið, sum tað var so synd í, og sum mamman ikki **vildi** og av og á ikki **kundi** taka sær av. Alt hettar, samstundis við at hann tosaði um barnið sum eitt hvørt annað knetti, fullkomiliga óávirkað av tíð og stað og annars øllum umstøðum yvirhøvur.

Hin sat meir professionelt politiskt og tosaði um, at tað so sanniliga vóru foreldrini sum høvdu ábyrgdina av børnunum, so bara ikki koma her og biðja um nakað, samstundis sum hann sat og fektaði við gratisprincippinum og tí góða viljanum, og so danska statinum í endanum. Báðir sótu teir og langaðu eina mammu í høvdið við aðrari.

Og hvat kom so burtur. ONKI.

Men so sanniliga ein fundir vit seint gloyma, hvussu fegin vit enn vilja. Ja, fyri at siga tað sum tað er, hattar var faktiskt eitt sindur pinligt...

Sigrun Samuelsen

P. S. Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, sigur í grein í Sosialinum 6. juni 85: »Samanumtikið haldi eg, at vit hava stuðlað tey, sum longu fáa stuðul — eitt nú gjøgnum dagstovnin. Nú er tíðin komin, tá vit eiga at stuðla familjuni, har mamman er heima. Hesi liggja ikki samfelagnum til byrðu, og kortini hevur ikki áður verið upp á tal, at stuðla teimum«.

Hettar kann ikki skiljast øðrvísi, enn at tær mammur sum í dag eru í útivinnu og hava barn sítt á dagstovni, liggja samfelagnum til byrðu. Meinar N. P. D. veruliga, at hesar mammur liggja samfelagnum til byrðu, mammur sum fyri tað fyrsta gjalda 30% av stovnsplásskostnaðinum sjálvar, avtrat tí at tær við síni arbeiðsmegi stuðla samfelagnum, og síðani gjalda skatt, sum er nógvar ferðir meira enn samfelagsins partur (30%) av stovnskostnaðinum? Er tað so, ja so stendur verðin ikki longur. Og umboðar støða landsstýrismannsins í hesum máli støðuna hjá sitandi landsstýri, ja, so raplar hon longu í morgin.

Heimsleiðari vitjar

Friggjadagin fær Frelsunarherurin í Føroyum stórfingna vitjan. Tað er Wahlström generalur, ið nú hevur høvuðsábyrgdina av felagsskapinum, sum virkar í 86 londum.



Hann fór í 1937 frá 1. deild í Helsinki á altjóða krígsskúlan í London. Eftir at hava verið sersjantur har í eitt ár fór hann heimaftur til Finnlands, har hann í mong ár í Frelsunarherinum fekst við ungdómsarbeiði og ymiskt fyrisitingararbeiði. Síðan bleiv hann næstovasti offiserurin í Finnlandi, og í 197 varð hann fluttur í somu tænastu í Canada og á Bermuda. Fimm ár seinni fór hann aftur til Finnlands sum territorialleiðari, eina stutta tíð var hann landsleiðari í Svøriki, til hann í 1981 varð útnevndur til general.

Wahlström ferðast víða í sínum arbeiði, bæði fyri at síggja, hvussu arbeiðið gongur, og fyri at stuðla sínum arbeiðsfeløgum.

Frelsunarherurin gleðir seg nógv til at fáa Wahlström og konuna á vitjan. 60 ár eru liðin síðan Frelsunarherurin fór at virka í Føroyum, og hetta er fyrsta vitjanin av slíkum slag.

Aðrir gestir

Harumframt kemur Martin Höberg kommandørur og konan at vitja. Höberg hevur vitjað í Føroyum áður. Hann hevur ábyrgdina av arbeiðinum í Noregi, Íslandi og í Føroyum.

Við í ferðini verða eisini bladstjórin fyri War Cry, William Clark, oberstloytnantur, privatskrivarin hjá generalinum, John Larsen, kapteynur, divisiónsoffiserarnir Dánjal, kapteynur og frú Anna Gurine Oskarsson.

Vitjanin varir til sunnudagin 16. juni. Fríggjakvøldið verður ein serligur sang- og tónleikafundur í auluni í Evsturskúlanum. Har fer m. o. Juniorgospel at framføra ein musical við heitinum »Nú er tað jørðini vitjan fær.«

Sunnukvøldið verður almennur fundur í hølunum hjá Frelsunarherinum.

LYDEX
ÚTSTOYT
til flestu bilar
á goymslu



LYDEX
Minst líka gott
sum originalt
Andreas M. Andreasen
Bøgøta 16, tlf. 13816

Háskúli

Hevur tú hug at royna okkurt annað enn tað tú tekst við í løtuni? Yvast tú í, hvat tú skalt nýta teir 5 komandi mánaðirnar til? Tørvar tær inspiratión? So stendur tær eitt rimmar tilboð í boði.

5 km. sunnan fyri Helsingør — í Espergærde — liggur ein háskúli, ið verður rikin av DSU, ið merkir Danmarks sosialdemokratiske ungdom. Ætlanin við hesum skúlanum er at læra og upplýsa ungdóm um organisatión og politik, ella hvussu vit kunnu læra at ávirka samfelagið, umhvørvið rundan um okkum og at gera vart við okkum.

Men ein háskúli er eisini nógv meira enn hetta. Tú býr og livir saman við øðrum ungum, lærir týdningin av samarbeiði og felags upplivilsum, lærir at taka støðu til ymiskt saman við øðrum og hevur tað hugnaligt og stuttligt.

Hesin háskúlin bjóðar 3 ungum føroyskum javnaðarfólkum ókeypis luttøku. Einasta treytin er, at tú ert millum 17 1/2 og 30 ár.

Næsta skeiðið byrjar 7. juli og endar 23. november. Rammurnar á hesum skeiðnum eru ungdómsárið og kommunuvalið og innan hesar rammurnar kemur tú at læra eitt sindur um m.a. ungdómspolitik, ung í 3. heiminum, ung á arbeiðsmarknaðinum, fritiðarsamfelagið, ávirkan, fjølmiðlar og útbúgvingarskipanina. Harafturat verður ein ferð gjørd til Polen fyri at síggja munin á einari danskari og einari polskari kommunu.

Um tú heldur hetta ljóðar áhugavert og kundi hugsað tær at fari við ella frætt meira um skúlan, kanst tú seta teg í samband við S.U. á tlf. 15510 eftir kl. 17. Ella tú kanst ringja ella skriva beinleiðis til skúlan. Addressan er: Solhavegården, Strandvejen 388 A, 3060 Espergærde. Tlf. (02)232285, skjótast til ber.